Mentamálaráðið

Lógartænastan

Dagfesting:	20. juni 2019
Mál nr.:	Skrivið her
Málsviðgjørt:	HZH/TH
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Kunngerð um broyting í kunngerð um felagsreglur í yrkisnámi fyri næmingar, sum byrja útbúgvingina skúlaárið 2013/2014 ella seinni, sum broytt við kunngerð nr. 110 frá 10. desember 2014.
(Skúlaskeið)

§ 1

Í kunngerð nr. 83 frá 4. juni 2013 um felagsreglur í yrkisnámi fyri næmingar, sum byrja útbúgvingina skúlaárið 2013/2014 ella seinni, sum broytt við kunngerð nr. 110 frá 10. desember 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á kunngerðini verður orðað soleiðis:
"Kunngerð
um
felagsreglur í yrkisnámi"

2. § 1 stk. 2. Verður orðað soleiðis:"*Stk. 2.* Í samráð við skúlan avgerð yrkisnevndin, hvussu skúlaparturin fyri tøkniligu yrkisútbúgvingarnar verður skipaður."

3. § 2. Verður orðað soleiðis: "Upptøka til tøkniligu yrkisútbúgvingarnar og handils- og skrivstovuútbúgvingarnar er treytað av, at næmingurin hevur lærusáttmála.
Stk. 2 Um næmingagrundarlag er fyri tí, kann skúlin gera av at taka næmingar upp tvær ferðir um árið.
Stk. 3. Næmingur, sum ikki hevur lærusáttmála, kann verða tikin upp til 1. skúlaskeið, treytað av at hann fyrst hevur staðið fyrireikingarskeið til yrkisútbúgving við nóg góðum úrsliti.
Stk. 4. Fyrireikingarskeiðið til yrkisútbúgving er lýst í námsskipan."

4. § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Upptøka á útbúgvingarnar nevndar í §1 pkt. 3 og 4 er treytað av, at umsøkjari hevur fráfaringarprógvtøku fólkaskúlans, 9. flokk."
Stk. 2. verður strikað, og stk. 3 verður til stk. 2.

5. § 4 verður strikað.

6. § 5 verður orðað soleiðis: "Fyri at verða tikin upp á 2. skúlaskeið í tøkniligari yrkisútbúgving og útbúgving innan handil og skrivstovu, skal næmingurin við nóg góðum úrsliti hava staðið 1. skúlaskeið og hava ein galdandi lærusáttmála."

7. § 6, stk. 3 verður strikað.

8. § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Almennar lærugreinar skulu geva útbúgvingini fakliga breidd, taka atlit til yrkisøkið hjá lærlinginum/næminginum umframt menna lestrarførleika lærlingsins/næmingsins."

9. § 10 *stk 2.* verður strikað.

10. § 17, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Í yrkislærugreinunum verður eftir hvørt skúlaskeið framd ein innanhýsis eftirmeting sambært námskipanini fyri ávísu yrkisútbúgvingina.

11. § 18 verður orðað soleiðis: "Treytin fyri, at næmingur kann halda fram á næsta skúlaskeiði er, at talmetið fyri innanhýsis eftirmetingina í yrkislærugreinunum, sbrt. § 17, stk. 1, í minsta lagi er 02.
Stk. 2. Næmingur, sum ikki lýkur treytirnar í stk. 1 fyri at halda fram næsta skúlaskeið, kann eftir avgerð leiðara útbúgvingarstovnsins og í samráð við læruplássið fáa møguleika at taka skúlaskeiðið ella partar av skeiðnum umaftur."

§ 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Broytingarnar í § 1, nr. 3 eru tó galdandi fyri næmingar, sum byrja útbúgvingina í august 2020 ella seinni.

Mentamálaráðið, dagfesting

Hanna Jensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Skjal 1

Heitið á skjalinum